# SERSTØK BYGGISAMTYKT VIÐ MIÐHORN

SB_Tórshavn_Miðhorn_2022_1_X

Við heimild í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954, verða skipaðar hesar reglur fyri tað øki í Tórshavnar kommunu, ið nevnt er í 1. grein.

## §1. ØKI SAMTYKTARINNAR

Stk. 1. Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfesta kortskjali 1, partur av matr. nr. 1160a, Tórshavn, og allar jarðarlutir, sum eftir góðkenning av hesi byggisamtykt verða frábýttir nevndu ogn.

## §2. ENDAMÁL OG HEIMILD

Stk. 1. Endamálið við hesi serstøku byggisamtyktini, er at skipa bústaðarbygging á økinum, samsvarandi kortskjali 2.

Stk. 2. Økið liggur í A1 og A2 øki, sum sambært almennu byggisamtyktini kann brúkast til bústaðir.

Stk. 3. Sambært kap. IV, §5, stk. 9 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er ásett fyri A1 øki, at í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrliga avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir og víkjast frá ásetingum um tal av hæddum og hæddarásetingum, har lendið er soleiðis háttað, at tað fellur natúrliga inn.

Stk. 4. Fyri viðurskifti, sum ikki eru regulerað í hesi serstøku byggisamtykt, eru ásetingarnar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu galdandi.

## §3. NÝTSLA ØKISINS OG ÁSETINGAR Í ØKJUNUM

Økið verður býtt sundur í eindirnar A, B og C, samsvarandi kortskjali 2, og verða økini kannaði hesum endamálum:

Stk. 1. Øki A: Raðhúsabygging

1. Økið verður lagt til raðhúsabygging og felagsøki, felagshús, bilskýli, skúrar, hjallar og tílíkt.
2. Byggjast skulu í mesta lagi 21 raðhús.
3. Aðrar ásetingar viðvíkjandi bygging skulu verða í samsvar við A1 øki í almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu.

Stk. 2. Øki B: Íbúðabygging

1. Økið verður lagt til bygningar við leiguíbúðum í fleiri hæddum og felags hentleikar hjá íbúgvunum, felags øki, goymslurúm, parkeringskjallara og tílíkt.
2. Byggjast skulu í mesta lagi 41 íbúðir.
3. Aðrar ásetingar viðvíkjandi bygging skulu verða í samsvar við A2 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Stk. 3. Øki C: Íbúðar- og miðstaðabygging

1. Økið verður lagt til íbúðarbygging og miðstaðabygging, felagsøki, felagshús, torg og tílíkt.
2. Byggjast skulu í mesta lagi 35 íbúðir.
3. Niðasta hædd á økinum kann nýtast til annað virksemi so sum handlar og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur. Hinar hæddirnar skulu brúkast til íbúðabygging.
4. Virkini skulu kunna flokkast í umhvørvisflokki 1 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.
5. Norðurvenda framsíðan á íbúðarbygningunum skal ikki vera hægri enn 8 m til hægsta punkt við útvegg, mált frá planering A, sí prinsipp tekning á skjali 3.
6. Mønan á íbúðarbygningnum skal ikki vera hægri enn 9 m, mált frá planering A, sí prinsupp tekning á skjali 3..
7. Suðurvenda framsíðan í íbúðarbygninginum skal í vestara enda ikki vera hægri enn 10 m til hægsta punkt við útvegg og í eystara enda ikki vera hægri enn 12 m til hægsta punkt við útvegg mált frá planering B, sí prinsipp tekning á skjali 3. Framsíðan á íbúðarbygninginum skal ikki fara upp um hæddarkotu 131.

## §4. VEGIR OG PARKERING

Stk. 1. Vegir og parkeringspláss skulu gerast sambært ásetingum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

## §5. ÚTSJÓND HÚSANNA

Stk. 1. Øll bygging í økinum, sum byggisamtyktin fevnir um, skal gerast í samráð við byggifultrúan.

Stk. 2. Kommunan skilar sær rætt til at seta krøv til útsjónd av bygningum í sambandi við út- og umbygging ella nýbygging.

## §6. BYGGINGARMYNDULEIKI OG ÁTALURÆTTUR

Stk. 1. Byggingarmyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

## §7. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR HENNI

Stk. 1. Smávegis frávik frá reglunum í hesi byggisamtykt kann býráðið geva loyvi til, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

Stk. 2. Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.




**Tórshavnar Kommuna**
**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Uppskot til serstaka byggisamtykt fyri Miðhorn | | | | |
| **Undirheiti** | 1 | | | | |
| **Mát** | 1:4000 | | | | |
| **Dagur** | 29.03.2022 | **Journal** | 22/00644 | **Tekna** | RVH |




## Tórshavnar Kommuna
**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Uppskot til serstaka byggisamtykt fyri Miðhorn | | | | |
| **Undirheiti** | 2 | | | | |
| **Mát** | 1:2000 | | | | |
| **Dagur** | 29.03.2022 | **Journal** | 22/00644 | **Tekna** | RVH |






| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Tórshavnar Kommuna**<br>**Býarskipanardeildin** | | | | | |
| **Heiti** | Uppskot til serstaka byggisamtykt fyri Miðhorn | | | | |
| **Undirheiti** | 3 | | | | |
| **Mát** | | | | | |
| **Dagur** | 29.03.2022 | **Journal** | 22/00644 | **Tekna** | RVH |